Ingilín Didriksen Strøm
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um føroyska rossið, settur landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnuumálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Er ætlanin at menna lógarverk til skráseting og útflutning av føroyskum rossum?
2. Hvørjar aðrar ætlanir hevur landsstýrismaðurin fyri varðveitsluna av føroyska rossinum?
3. Heldur landsstýrismaðurin, at varðveitslan av føroyska rossinum er týdningarmikil í mun til altjóða sáttmálar um varðveitslu av lívfrøðiligum margfeldi?

Viðmerkingar:
Føroyska rossið er sermerkt og finst bara her í Føroyum. Varðveitslan av føroyska rossinum hevur í nógv ár dúvað upp á sjálvboðið arbeiði. Tá farið varð undir at varðveita rossið, vóru einans fimm ross á lívi. Í dag eru á leið 90 føroysk ross, harav 50 lívdjór. Skulu vit tryggja okkum, at stovnurin ikki doyr út, er neyðugt við 200 lívdjórum.

Men tað eru ov fá, sum ala, tí avtakararnir eru ov fáir, og við tí alingini, sum er í dag, veksur innannøringin so mikið, at kjansurin fyri, at stovnurin um nøkur ár ikki kann geva avkom, er stórur.

Í 2010 tóku Føroyar undir við altjóða sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi (CBD sáttmálin). Við hesum hava vit millum annað bundið okkum til at syrgja fyri varðveitslu av tí lívfrøðiliga margfeldinum, ið bara finst í Føroyum. Vit vita um onnur sløg, eitt nú føroysku kúnna, ið er útdeyð vegna vantandi átøk. IPBES metir í løtuni, at svinnið í lívfrøðiligum margfeldi gongur 100 til 1000 ferðir so skjótt, sum áður, vegna eitt nú dálking, veðurlagsbroytingar og menniskjaliga týning av búøki.

Í Føroyum eru nógv rossaáhugað og reiðfólk, ið eisini nýta onnur ross enn føroysk. Høvdu allir bøndur í Føroyum føroysk ross í tann mun, ið var burðardygt fyri landbúnað teirra, og um øll, sum kundu brúka føroysk ross, brúktu tey, so vóru tað framvegis ov fá til at bjarga stovninum frá at doyggja út. Tí er neyðugt við átøkum, skal føroyska rossinum vera lív lagað í framtíðini, og tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 8. januar 2021

Ingilín Didriksen Strøm